


www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 03 - 2012

# Positivt at føroyingar arbeiða uttanlands

Tað er positivt, at føroyingar arbeiða uttanlands. Hetta skapar inntøkur og serliga tá arbeiðsloysi er í Føroyum, og tað er tí umráðandi, at føroyingar hava áræði at átaka sær arbeiði uttanlands. Hetta er stabiliserandi fyri landshúsarhaldið, og somuleiðis verða førleikarnar hjá hesi arbeiðsmegini viðlíkahildnir, tíðarskeið tá vit ikki eru før fyri at bjóða størvini fram. Somuleiðis um vit hugsa um eina komandi oljuvinnu í Føroyum, er tað sera sera gott, at partur av føroysku arbeiðsmegini hevur royndir frá arbeiði í hesi vinnu uttanlands. Hesi fólk kunnu gerast grundarlagið fyri at landið, fyritøkurnar og fólki, fær sum mest burturúr, tá oljan verður funnin. Hetta segði Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum á áhugaverdum fyrilestrarkvøldið, sum Eysturoyar Vinnulívsfelag skipaði fyri herfyri undir heitinum - "Kappingin um føroysku arbeiðsmegi". (SÍ EISINI MYNDARØÐ FRÁ FUNDINUM Á TOFTUM) Vælútbúgvin arbeiðsmegi Vit tríva í nakað av tí, sum Marita Rasmussen segði - Føroysk arbeiðsmegi er lutvíst vælútbúgvin og eitt av hennara eyðkennum er, at hon er fleksibul og sera eftirspurd. Hetta eru kvalitetir, sum vit eiga at verða stolt av og gera okkara besta fyri at varðveita og stimbra enn meira, hetta óansæð, hvar arbeiðsmegin selur sínar tímar. Tað er sostatt sera týdningarmikið, at vit alsamt eru tilvitað um útbúgvingarnar vit bjóða, at tær eru hollar og í minsta lagi hava ta dygd tær hava í dag. Í londunum kring okkum hevur í seinastuni verið ført fram, at flest møgulig skulu taka hægri útbúgving. Hetta er rætt sæð út frá einum búskaparligum vinkli. Frágreiðingar frá OECD og øðrum staðfesta, at tað eru tey lond, sum satsa uppá útbúgving, sum standa seg best í mun til búskaparligan vøkstur. Eg vil tó staðiliga ávara ímóti, at vit gerast so snobbut og ikki hugsa útbúgving í breiðum høpi, tí vit mugu geva okkum far um tann stóra týdningin av at hava t.d. dugnaligar handverkarar og onnur við líkandi

stytri útbúgvingum. Sum dømi kann nevnast, at tey í Íslandi helst eru vorðin ov snobbut og hava mist ein part av ungdómsgeneratiónini til stytri fakligar útbúgvingar, og íslendski arbeiðsmarknaðurin kemur helst at mangla hesi sum frálíður. Hetta er nokk galdandi í Føroyum eisini, og spurningurin hevur eisini verið frammi í Norra fyri kortum, at stórur eftirspurningur er eftir fakligum handverkarum, og at ov fá verða útbúgvin. LO og NHO hava sett stóra verkætlan í gongd fyri at bøta um hetta. Lærlingatilgondin Hyggja vit eftir lærlingatilgongdini so sæst, at konjunkturin hevur nógv at siga fyri, hvussu nógvar lærlingar vinnan setir. Hetta kann vinnan gera nakað við, og hetta kann hjálpa uppá tilgongdina til arbeiðsmegi við røttu førleikunum. Í Føroyum eru vit eftirbátar, tá tað kemur til at raðfesta útbúgving generelt. Hetta er helst orsøkin til, at føroyingar í miðal ikki eru líka væl útbúgvin, sum fólkið í grannalondunum. Hetta kann løgtingið gera nakað við, og hetta kann vinnan gera nakað við. Uttanlands er eftirspurningurin eftir arbeiðsmegini drivin av, at øll framkomin samfeløg hava ta avbjóðing, at tað er alt størri partur av arbeiðsmegini, sum gerst óvirkin ella er í tí støðu, at tað eru almennu kassarnir, sum forsyrgja teimum. Tvs. eru pensjónistar vegna aldur ella vegna óarbeiðsføri, lesandi osv. Hesi viðurskiftini gera, at hesi lond, sum í stóran mun fyri kanska 20 árum síðani innfluttu ófaklærda arbeiðsmegi, hava lagt politikkin um, til at leggja dentin á at fáa fatur á arbeiðsmegi uttanlands frá, sum hava útbúgving. Hetta verður gjørt m.a. við at seta í verk serligar skattaskipanir fyri útbúgvin fólk, soleiðis at hesi í øllum førum í tíðarskeið fáa kontantar fyrimunir av at velja at flyta til hesi lond. Hesar skipanir kallast ofta ekspertskipanir. Í Føroyum er støðan tann, at talið á arbeiðsvirknum er høgt millum tey 16-64 ára gomlu. Hetta er sera gott og positivt og nakað vit eiga at verja um tað vit kunnu. Tað er tó soleiðis, at talið á teim arbeiðsvirknu er minkandi av somu orsøk sum í grannalondunum og tí, at fólkatalið ikki veksur. Somuleiðis er fráflyting ein stór avbjóðing sum methøga burðaravlopið í Føroyum ikki einsamalt klárar at lyfta. Serliga er tað ungdómurin, sum velur Føroyar frá. Ungdómurin, sum hetta samfelagið hevur gjørt stórar íløgur í gjøgnum lívsleiðina. Løntakarar uttanlands Samanumtikið kann sigast, at tað eru - 1. Tendensurin er, at eini 400-500 fólk eru í DIS 2. 300 undir øðrum skipanum enn DIS 3. Handverkarar eitt sindur upp og niður 150 fólk í 2010 a. 2011 tølini ikki tøk enn, men hava varðhugan av, at fleiri handverkarar arbeiða uttanlands 4. 400 fólk arbeiða í fiskivinnu uttanlands 5. Tilsamans 12-1.300 fólk starvssett uttanlands, men búgva her Ein leyslig meting er, at hetta gevur áleið hálva milliard til føroyska búskapin. Ímyndi tykkum um hesi ikki vóru til arbeiðis, men í ALS? Eyðkennini við hesum størvunum er, at tey eru vælønt, umframt at tey flestu av hesum eru undir eini lagaligari skattskyldu. Tað er positivt, at føroyingar arbeiða uttanlands. Hetta skapar inntøkur og serliga tá arbeiðsloysi er í Føroyum, og tað er tí umráðandi, at føroyingar hava áræði at átaka sær arbeiði uttanlands. Hetta er stabiliserandi fyri landshúsarhaldið, og somuleiðis verða førleikarnar hjá hesi arbeiðsmegini viðlíkahildnir, tíðarskeið tá vit ikki eru før fyri at bjóða størvini fram. Somuleiðis um vit hugsa um eina komandi oljuvinnu í Føroyum, er tað sera sera gott, at partur av føroysku arbeiðsmegini hevur royndir frá arbeiði í hesi

vinnu uttanlands. Hesi fólk kunnu gerast grundarlagið fyri at landið, fyritøkurnar og fólki, fær sum mest burturúr, tá oljan verður funnin. Útlendsk arbeiðsmegi Hinvegin kunnu vit helst ikki annað enn verða samd um, at afturlatnu føroysku hurðarnar fyri útlendskari arbeiðsmegi ger, at um føroyskt vinnulív kemur í ta støðu, sum vit vóru í, í 2007-2008, tá arbeiðsloysi kom heilt niður á 1,1%, sum elvdi til eina massiva lønarglíðing akkurát sum tá, og sostatt eitt stórt trýst á kappingarføri hjá føroyskum fyritøkum. Ein av orsøkunum til hetta er at hurðin inn á føroyska arbeiðsmarknaðin er stongd. Tað er tískil altavgerandi, at hurðin út av føroyska arbeiðsmarknaðinum verður útskift við eina karusell. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tískil, at tað er ein nógv størri trupulleiki fyri vinnulívið, at tað ikki ber til at fáa arbeiðmegi inn í landið, enn tað, at nógvir føroyingar leita sær arbeiði uttanlands harímillum í frálandavinnuni. Í Føroyum er støðan tann, at danska útlendingalógin framvegis er galdandi. Tað merkir, at hvør einasti ein, sum er frá øðrum landi enn norðanlandi skal ígjøgnum eitt nálareygað fyri at sleppa á føroyska arbeiðsmarknaðin. Hetta nálareygað er lítið og til tíðir, so lítið, at eingin sleppur ígjøgnum t.d. tá arbeiðsloysi er. Tó so undantøk kunnu gerast fyri vinnugreinar/størv har eingin arbeiðsleysur er í Føroyum. Um so er, at arbeiðsloysi í Føroyum lækkar niðurum 3.5% kann hugsast, at vit aftur fáa skipanina setta í verk, har ES borgarar lættligari kunnu koma til Føroya at arbeiða, men ikki fólk uttanfyri ES. Hetta er ein trupulleiki fyri vinnulívið og samfelagið alt. Orsøkin til tað er, at føroyskar fyritøkurnar fáa ikki gagnnýtt møguleikan at forvinna pening, tá hákonjunkturur er orsaka av hesum, og sostatt ikki konsolidera seg, til verri tíðir. Hetta er viðvirkandi til, at konjuktursveiggini, sum annars eru ógvuslig í lítla føroyska búskapinum, gerast enn ógvusligari enn neyðugt er, tá hákonjunkturur er. Um føroykst vinnulív ikki fær fría atgongd til arbeiðsmegi, megna vit heldur ikki at flyta okkum til at gerast enn betri kappingarfør um egna arbeiðsmegi. Avbjóðing Starvsfólk í frálandavinnuni, farmaflotanum og fiskiflotanum uttanlands hava góðar starvstreytir, sum vit hava sera torført at kappast við. Størri yvirskot, konsolidering og menning av fyritøkunum er ein fortreyt fyri, at vit ikki gerast enn størri eftirbátar. At tað eru føroyingar, sum arbeiða uttanlands og búgva í Føroyum er eisini ein avbjóðing. Uttan at øvunda teimum teirra treytir er tað eitt faktum, at summar kommunur eru hart raktar av íbúgvum, sum eru undir DIS; NIS; FAS líknandi skipanum og gongdin seinnu árini hevur gjørt, at alt fleiri eru, sum starvast undir hesum skipanum. Spurningurin er, um til ber at kompensera fyri hesum. Ein møguleiki er, at kommunurnar seta kommunuskattin niður og samstundis innføra nýtslugjøld fyri allar borgarar. Hetta kann verða nýggj nýtslugjøld, sum vit kenna frá grannalondunum, t.d. fyri vatn, renovatión, busskoyring ella hækking av verandi gjøldum t.d. fyri barnaansing. Hetta smakkar illa hjá mongum, men nýtslugjøld hava tað við sær, at tey stilla eftirspurningin eftir tænastuni og minka sostatt um útreiðslurnar hjá kommununum og so tað, at øll mugu gjalda fyri tænasturnar, sum kommunurnar veita. Vit hava útbúgvingarskipanir, sum framleiða arbeiðsmegi til hesi størvini, umframt til størv á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hetta eru nokk serliga útbúgvingarnar, sum Vinnuháskúlin stendur fyri, umframt tær handaligu útbúgvingarnar, sum

vinnan stendur fyri, saman við teknisku skúlunum. Tey, sum verða útbúgvin gjøgnum hesar skipanir eru fyrst og fremst tey, sum arbeiða uttanlands serliga í frálandavinnuni. Tað er ikki ivi um, at tað er neyðugt at seta fokus á at útbúgva fleiri, serliga um føroyska vinnan skal hava møguleika fyri at hava ein part av hesi arbeiðsmegi tøka her í Føroyum. Harumframt er tað soleiðis, at umleið helvtin av teimum, sum fara uttanlands at lesa, sum ikki koma heimaftur á klettarnar eftir lokna útbúgving, og tey síggjast tíverri ikki aftur í føroyska búskapinum. Fyri vinnuna hevur tað stóran týdning, at vit eru før fyri at kappast um hesa arbeiðsmegina. Týdningarmikil fyri búskapin Marita Rasmussen tók til endans samanum - Tey, sum arbeiða uttanlands tað veri seg í frálandavinnuni, fiskivinnuni ella við útlendskum farmaflota eru týdningarmikil fyri føroyska búskapin. Hvar hesi fólk arbeiða er sum so líka mikið fyri føroyska búskapin, so leingi tey eru búsett í Føroyum. Tað hevur tískil týdning, at tað er áhugavert hjá teimum at hava bústað í Føroyum. Soleiðis sum útlitini eru verður tað framhaldandi gamaní hjá føroyingum at fáa arbeiði aðrastaðni. Er eftirspurningurin stórur eftir arbeiðsmegini, ja so er ein streymur av arbeiðsmegi út av landinum. Hetta verður ein av stóru avbjóðingunum, sum føroyskt vinnulív fær komandi árini. Tað hevði tískil verið skilagott at útbúgvið fleiri av hesum fólkum, soleiðis at fleiri verða eftir til føroyska vinnulívið at taka av. Tað er alneyðugt, at vit somuleiðis opna hurðarnar fyri útlendskari arbeiðsmegi, soleiðis at føroykst vinnulív hevur atgongd til starvsfólk og førleikar, sum krevjast til eina og hvørja tíð og sostatt verður ført fyri at forvinna pening til framtíðar menning. Fáa vit ikki hesar broytingar og hesa menning í fyritøkunum, saktar føroyska vinnan afturút í mun til at vera før fyri at borðreiða við spennandi størvum og tí løn, sum skal til fyri at halda uppá bestu starvsfólkini.